

Installatiónin hjá Anniku varð vist í einum fýrakantaðum sjónvarpi mitt í organiska umhvørvinum í Vetrarurtagarðinum.

Mynd: Símun Jóannesarson

dýnan og koddin vóru fýrakantað, vindeyguni vóru fýrakantaði, veggirnir vóru fýrakantaðir og hurðin var fýrakantað, sjálvt teppið á gólvinum var fýrakantað. Eg fór upp og út í køkin, aftur fýrakantar allasastaðni køliskápið, komfýrurin, skápini, bøkurnar, myndirnar á vegginum, stólar, borð, hillar alt fýrakantað.

– Eg hugdi út gjøgnum vindeyga, fýrakantaðir vegir og alla staðni fýrakantaðir bygningar. Eg hugsaði, hvat er tað sum ger, at vit skulu hava alt at passa inn í fýrakantaðar karmar. Eg veit væl, fólk siga, tað er effektivt og praktiskt, men tað er snedigt, at vit gera tað við alt. Heimurin er rundur, tað er tann organiski formurin, men sjálvt heimin hava vit gjørt fýrakantaðan, tá vit hava teknað heimskortið, sigur Annika og heldur fram.

– Eg fór út, eg búgvi á Oryasundskollegiinum. Aftur fýrakantar, allastaðni á gongini fýrakantaðar hurðar við fýrakantaðum durðaskeltum, fýrakantaði vindeygu og fýrakantaðar flísar á gólvinum. So inn gjøgnum fýrakantaðu dyrnar á elevatorinum, ið eisini er fýrakantaður. Uttan fyri aftur teir beru fýrakantar.

## Fýrakantaði eygu

– Eg avgjørdi tí, at fara at avmynda teir fýrakantarnar, sum eg síggi ein dag og vísa teir í einum sjónvarpi. Tað virkaði passandi, tí eitt sjónvarp er fýrakantað, og tú fært eisini fýrakantaði eygu av at hyggja at sjónvarpi, sigur Annika.

– Eg vildi gjarna sýna tað fram her inni á Glyptotekinum, greiðir hon frá.

– Vetrargarðurin er organiskur og vakur, og tí var tað eitt væl hóskandi stað at vísa hesa framsýngina. Men samstundis er Glyptotekið fýrakantað, bæði so og so, og danir kunnu eisini gott vera eitt sindur fýrakantaðir, so á tann hátt er tað eisini hóskandi.

## Debut í Glyptotekinum

Men hvussu ber man seg at við at debutera á einum so nógv virdum framsýningarhølli sum Glyptotekinum?

– Hetta er ein verkætlan, ið eg havi gjørt í sambandi við skúlan hjá mær, og í hesari havi eg samstarvað við nøkur lesandi á Universitetinum í Keypmannahavn. Tey skrivaðu og sendu umsóknina um at sleppa inn her at sýna fram. Eg ivist í, at eg sjálv hevði klárað at skrivað eina nóg góða umsókn, greiður Annika frá.

## Langdrigið arbeiði

Upprunaliga hevði Annika tikið umleið 1000 myndir av fýrakantum, ið hon hevði rent seg í. Hesar eru kókaðar niður til tær umleið 400 bestu. Men klippingin og samansetingin av øllum 400 myndum hevur verið strævið og langdrigið arbeiði.

Tuborg Fonden dámdi somikið væl hugskotið, at fondurin valdi at stuðla sýningini fíggjarliga, og hevur gjørt hana møguliga.

Annika varð í summar liðug við eitt ára lesturin á lista myndaskúlanum Fatamorgana. Men fekk so eitt praktikkpláss á skúlanum og verður tí verandi har til árskiftið. Ætlanin er tó, at halda fram við at arbeiða við listini.

Á installatiónini verða fýrakantarnir vístir við somikið høgari ferð, at teir missa sína meining og gerast bert formur.

myndir: Annika J. á Lofti















